Stjørnan-Kyndil 42-15(22-11):

# Stórsigur til Stjørnuna

**Oddaliðið vann stórsigur á Kyndli í KÍ-høllini hóskvøldið**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Hóskvøldið leiktu Stjørnan og Kyndil ein framskundaðan dyst í KÍ-høllini í Klaksvík. Úrslitið av dystinum segði næstan seg sjálvt undan dystinum, tí talan var um ein dyst millum topp og botn í Sunset-kappingini, og tað er ikki nakað dulsmál, at hjá kvinnunum er sera stórur munur millum tey fremstu og aftastu liðini.



*Tað var ongantíð nakar ivi, tá Stjørnan hóskvøldið tók ímóti Kyndli*

### Heilt galið eftir steðgin

Í fyrra hálvleiki megnaði Kyndil at fylgja við heimaliðnum allarfyrstu løtuna, men eftir at tað hevði staðið á jøvnum 4-4, tá ið slakir tíggju minuttir vóru leiktir, var ongantíð nakar ivi. Stjørnan tók nú leiðsluna, og tær hugdu ongantíð aftur um seg, men bara øktu um leiðsluna hjá sær og skoraðu nærum eftir vild.

Kyndlakvinnurnar vóru tó ikki heilt eiðasørar í fyrra hálvleiki, tí tær megnaðu hóast alt at fáa bóltin í Stjørnumálið ellivu ferðir fyri steðgin. Trupulleikin hjá teimum var bara tann, at Stjørnan skoraði tvífalt so nógv mál.

Í seinna hálvleiki sást munurin á liðunum heilt týðuligani. Nú stongdi verjan hjá Stjørnuni málið, og tær grønu úr Havn høvdu ómetaliga trupult við at fáa bóltin í málið hjá Stjørnuni. Tað eydnaðist teimum bert at fáa fýra mál í seinna hálvleiki, meðan heimaliðið framvegis helt á at skora við somu ferð. Munurin millum liðini vaks tí støðugt, og tá ið teir 60 minuttirnir vóru farnir aftur um bak, stóð tað 42-15 til Stjørnuna á máltalvuni.

**Stjørnan-Kyndil 42-15(22-11)**

**Stjørnan:** Anna Kristina Samson 8, Annika Ljósstein 8(4), Katarina Stjepanov 7(1), Alina Olaru 6, Bára Skaale Klakstein 4, Una Olsen 4, Joan M. Djordjevic 3, Maria við Neyst 2
**Kyndil:** Lotte Sørensen 4(2), Anya Midjord 3, Linda Weihe 2, Ann-Mari Wang 2, Hildur Høghamar 2, Randi Wardum 2
**Brotskøst:** Stjørnan 6(5), Kyndil 2(2)
**Útvísingar:** Stjørnan 3, Kyndil 4
**Dómarar:** Poli Hansen og Hartvig Joensen

SUNSET KAPPINGIN

KVINNUR

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 6 | 6 - 0 - 0 | 554 | 379 | 175 | 25 |
| 2 VB | 4 | 4 - 0 - 0 | 584 | 350 | 234 | 21 |
| 3 Neistin | 6 | 4 - 0 - 2 | 565 | 425 | 140 | 18 |
| 4 Søljan | 5 | 3 - 0 - 2 | 500 | 445 | 55 | 14 |
| 5 VÍF | 5 | 1 - 0 - 4 | 436 | 447 | -11 | 7 |
| 6 StÍF | 5 | 1 - 0 - 4 | 424 | 490 | -66 | 7 |
| 7 Kyndil | 6 | 2 - 0 - 4 | 397 | 545 | -148 | 7 |
| 8 Tjaldur | 5 | 0 - 0 - 5 | 282 | 661 | -379 | 0 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN

MENN

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 8 | 7 - 0 - 1 | 527 | 465 | 62 | 22 |
| 2 Kyndil | 8 | 4 - 0 - 4 | 534 | 446 | 88 | 16 |
| 3 StÍF | 8 | 5 - 2 - 1 | 483 | 506 | -23 | 15 |
| 4 KÍF | 8 | 3 - 1 - 4 | 448 | 489 | -41 | 11 |
| 5 H71 | 8 | 2 - 0 - 6 | 515 | 535 | -20 | 9 |
| 6 Neistin | 8 | 1 - 1 - 6 | 489 | 555 | -66 | 6 |

Flogbóltsstøður
Meistaradeild, kvinnur

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 18 | 15 - 3 | 47 | 15 | 32 | 21 |
| 2 TB | 18 | 15 - 3 | 47 | 22 | 25 | 21 |
| 3 Dráttur | 18 | 10 - 8 | 39 | 30 | 9 | 16 |
| 4 ÍF | 18 | 8 - 10 | 30 | 33 | -3 | 12 |
| 5 KÍF | 18 | 5 - 13 | 19 | 42 | -23 | 6 |
| 6 SÍ | 18 | 1 - 17 | 12 | 52 | -40 | 2 |

Meistaradeild, menn

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 15 | 14 - 1 | 43 | 11 | 32 | 21 |
| 2 Mjølnir | 14 | 10 - 4 | 34 | 17 | 17 | 14 |
| 3 Fleyr | 14 | 8 - 6 | 28 | 26 | 2 | 11 |
| 4 ÍF | 14 | 3 - 11 | 16 | 36 | -20 | 5 |
| 5 Fram | 15 | 1 - 14 | 12 | 43 | -31 | 1 |

# VB skal spæla tvær ferðir

**Vágskvinnur koma norður til miðstaðarøkið í vikuskiftinum, og tær skulu spæla bæði leygardag og sunnudag**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað eru bert tríggir dystir á skránni í Sunset-kappingini um vikuskiftið. Upprunaliga skuldu tað verða fimm, men tveir vóru framskundaðir og eru longu avgreiddir.

### Spennandi á Giljanesi

Ivaleyst mest spennandi dysturin verður á Giljanesi leygardagin, har Søljan fær vitjan av VB. Gamaní hava VB og Stjørnan verið væl betur enn næstu liðini í ár, men tað er ikki so langt síðani, at Søljan vitjaði í Vági, og tá hevði VB stórar trupulleikar av at basa vágaliðnum. Harumframt var VB heldur ikki sannførandi seinasta vikuskifti, tá ið tær høvdu vitjan av VÍF, sum tapti við bert tí eina málinum.

Sunnudagin skulu vágskvinnur aftur í dyst. Hesaferð skulu tær inn á Skála at hitta StÍF. Her er talan um ein dyst, har tað eigur at verða gjørligt hjá VB at taka sær eitt sindur av løttum, og kanska lata nakrar av stuðulsspælarunum hvíla eitt sindur. Men hinvegin ræður tað tó um hjá VB at vinna greiðar sigrar, tí tað er ikki óhugsandi, at tað verður málmunurin, ið verður avgerandi, tá ið ein føroyameistari skal finnast.

Seinasti dysturin um vikuskifti verður í Runavík sunnudagin, har botnliðið Tjaldur fær vitjan av VÍF. Óivað verður talan um enn ein lemjandi ósigur til Tjaldur, sum vikuskifti aftaná vikuskifti kann staðfesta, at tað var eitt langt lop hjá teimum at flyta upp í bestu deildina.

# Nærkast endanum

**Næstseinasta umfarið í meistaradeildini hjá kvinnum verður leikt um vikuskiftið.**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tríggir dystir eru á skránni leygardagin og sunnudagin. Leygardagin verður dystur á Kambsdali, har ÍF fær vitjan av Drátti. Her kann gerast talan um ein spennandi dyst, tí ÍF hevur bitið væl frá sær í seinastuni, meðan Dráttur hinvegin hevur havt ein lítlan niðurtúr.

### Oddaliðini lættar uppgávur

Á pappírinum sær tað út til, at tey bæði oddaliðini, Mjølnir og TB, hava lættar uppgávur um vikuskiftið. Bæði liðini eru á heimavølli, og bæði skulu tey spæla móti botnliðum.

Í Klaksvík fær Mjølnir vitjan av avgjørda botnliðnum SÍ, og tað hevði verið einki minni enn ein sensatión, um tað skuldi eydnast sørvágskvinnum at fáa nakað burtur úr tí dystinum. Mjølnir liggur ájavnt við TB í stigum, men hevur betur settmun, og tí fara tær eisini óivað at gera alt fyri ikki at missa óneyðug sett, sum kunnu kosta teimum dýrt seinni.

TB fær í Trongisvági vitjan av KÍF, og hóast TB í seinastuni hevur havt eitt sindur stríggið við at basa lægru liðunum, so er einki at ivast í, at talan er um ein dyst, sum TB óivað vinnur. Men TB hevur, sum áðurnevnt, fleiri ferðir verið noytt til at spæla javnbrótara móti lægri liðum í seinastuni, og spurningurin er so, um hetta fer at endurtaka seg sunnudagin.